## Stjórin leggur frá sær

Keld Askær, stjóri í Royal Greenland, fer at leggja frá sær, tá ið hetta árið er umliðið.

Tað var grønlendska blaðið, Sermitsiaq, sum bar hesi tíðindi herfyri.

Royal Greenland er størsta felag av sínum slagi í Grønlandi.

Sambært blaðnum, eru stjórin og stýrisformaðurin samdir um, at Royal Greenland nú skal hava ein nýggjan oddamann.

Grønlendska blaðið veit at siga, at Keld Askær leingi hevur verið ein umstríddur persónur, men sigur seg ikki vita ítøkiliga orsøkin til, hví hann skal leggja frá sær nú.

**-vilmund.**

## Havið tømist ikki



Norski fiskimálaráðharrin, Helga Pedersen, er ikki samd við altjóða granskarum um, at heimshøvini í framtíðini fara at tømast fyri fiskatilfeingi.

- Eg trúgvi ikki, at tað verður so galið, at høvini fara at tømast fyri fisk í ár 2048, sum granskarar sipa til.

Men, leggur hon aftrat:

- Hetta avhongur jú eisini av, hvussu væl vit duga at umsita fiskiríkidømið í havinum á burðardyggan hátt, og eg haldi, at tilvitanin um hetta vinnur frama kring um heimin.

Helga Pedersen heldur, at tað kann gerast neyðugt at minka um fiskiveiðikvoturnar fyri at tryggja, at stovnarnir verða veiddir burðardygt.

**-vilmund.**

# gdur at góðum fyritreytum




*Millum fyrilestrarhaldararnar á ráðstevnuni var Elin Heinesen, sum saman við Menningarstovuni eisini var fyriskipari. Hon legði seg serliga eftir at greiða frá, hvat netverk er, og hvat hetta kann brúkast til*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*- Hvat skal til fyri at klára seg í alheimsgjørda upplivingarsamfelagnum, og hvussu brynja vit føroyska vinnulívið til at møta hesum nýggju avbjóðingum, spurdi Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í setanarrøðu síni*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

legði hann aftrat.

Hann helt, at er tað góða ráevni til steðar, og "talentmassin" í landinum er førur fyri at framleiða dygdarvørur burtur úr ráevninum, gevur hetta ein góðan gróðrarbotn fyri vinnulívið.

- Men vørurnar vekja ikki ans, um tær ikki møta einum tørvi, sum er í marknaðinum frammanundan. Heldur ikki vekja vørurnar ans, fyrr enn tær verða vístar fyri teimum røttu málbólkunum á rættan hátt og í rætta tíðarbilinum.

Landsstýrismaðurin segði, at um vit øll vilja tað saman – ja, so røkka vit málunum, ið vit seta okkum.

- Eg vóni, at henda ráðstevnan fer at geva sítt íkast til upplivingarbúskapin í Føroyum og soleiðis seta ferð á og skapa synergi til gagns fyri bæði tann einstaka og føroyska vinnulívið sum heild, segði Bjarni Djurholm í setanarrøðu síni.



### Elin um netverk

Tað vóru Elin Heinesen og Menningarstovan, sum í felag skipaðu fyri vinnuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum.

Millum fyrilestrarhaldararnar var Elin sjálv, og hon legði seg serliga eftir, hvat netverk er, og hvat hetta kann brúkast til.

Ein av spurningunum, hon setti er, hví vit skulu netverka, sum hon tók til.

- Jú, tú skalt netverka, tí netverk kunnu 1) geva atgongd til ressursur, tá ið tú hevur brúk fyri teimum, 2) geva bíliga atgongd til ressursur, 3) víðka títt marknaðarvirði, 4) vera eitt rættiliga kostnaðarfrítt marknaðarføringsamboð.

Hon legði aftrat, at netverk gevur vitan um nýggjar rørslur og rák í marknaðinum, gevur atgongd til týdningarmikla insidervitan, gevur møguleikar til at breiða út tína vitan og fáa viðurkenning fyri tað, gevur møguleika fyri at skapa vitan saman við øðrum og gevur tær stuðul og undirtøku.

Elin nevndi ein hóp av møguleikum við at netverka, sum rúm ikki er á hesum sinni at endurgeva í smálutir.

- Tú finnur keldur og tilburðir/ cases, finnur samstarvsfelagar, finnur onkran, sum tú kanst geva uppgávur til, ið tú ikki hevur tíð til sjálv/ur og tú kanst fáa ráð um avtalur, sáttmálar og lønarsamráðingar.

### Ymiskar "typur"

Í sínum fyrilestri nevndi hon fýra ymiskar "typur" av netverkarum, 1) einspennarin, 2) tann vertskapsligi, 3) tann snúðni og 4) brúgvabyggjarin.

- Er tú einspannarin, ert tú sannførdur um, at tú klárar alt best sjálv/ur. Tú heldur, at tað er "snýt" at fáa ráð frá um lættari mátar at loysa uppgávur skjótari. Tú heldur, at tað ger teg veikari at býta út av tíni vitan – og tú ert bangin fyri at liggja øðrum til last.

Hon lýsti síðan tann vertskapsliga netverkaran, sum leggur meira dent á at náa at heilsa uppá nógv – heldur enn at minnast, hvat tey eita, og hvat tey gera.

- Tú hevur "nøs" fyri, hvør ið ER nakað, tú dugir at føra teg fram í einum selskapi, men spennir bein fyri teg sjálva/n, tí tú í veruleikanum ikki gevur nakað ektað av tær.

Hon segði, at tann snúðni netverkarin setir seg bara í samband við fólk, um viðkomandi roknar við at fáa vinning burtur úr tí. Tú heldur "roknskap" við, um onnur geva tær tænastur aftur. Tú brúkar fegin hugskot frá øðrum uttan at føla, at tú stjelur tey – og tú kanst misnýta álitið hjá øðrum.

- Ert tú hinvegin brúgvabyggjarin, trýrt tú upp á egið virði, tú ber ikki ótta fyri at biðja onnur um nakað, tú ber ikki ótta fyri at skapa nýggj sambond millum fólk, sum tú heldur kunnu fáa nyttu av at kenna hvørt annað - og tú er kanska í vanda fyri, at "servicegeniið" tekur yvir, soleiðis at onnur útnytta teg.

### Góður netverkari

Elin hevði í sínum fyrilestri eitt boð uppá, hvat ein góður netverkari er.

- Hesin ber ikki ótta fyri at seta seg í samband við onnur, er opin fyri umheiminum og forvitin uttan at vera nærgangandi, ber ikki ótta fyri at geva ella taka ímóti, ber ikki ótta fyri ymiskleika, bjóðar seg fram, byggir brýr, er álítandi og hevur trúvirði.

Hon vísti á, at netverk er gull vert.

- Netverk gevur kanska ikki úrslit beinanvegin, men yvir longri tíð. Netverk er ein strategi – og ein íløga. Títt netverk er tín sosiali kapitalur – tær ressursir, sum tú hevur atgongd til umvegis netverkið. Títt netverk er IKKI tín marknaður, men tey fólk, sum vilja hjálpa tær á marknaðinum, segði Elin Heinesen millum annað í sínum áhugaverda fyrilestri.

*Hvussu fáa vit meira samstarv millum vinnu og mentan, og hvussu kunnu vit brúka upplivingarbúskap í Føroyum, vóru spurningar, sum høvdu áhuga millum tey, ið vóru við á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*